# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

11. juli fingu Ingrid og Marner Kjærbæk eina dóttur. Hon vigaði 3580 gr og var 52 cm long.

15. juli fingu Guðrið Müller úr Kvívík og Bárður Egholm av Eiði, búsitandi í Keypmannahavn, eina dóttur. Hon vigaði 3680 gr. og var 55 cm long.

21. juli fingu Sára Strøm og Páll Horn eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3900 gr.

23. juli fingu Guðrun T. Jacobsen og André Kruse, Eiði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3950 gr.

24. juli fingu Amy og Finn Heri Johannesen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3350 gr.

27. juli fingu Palma A. Petersen og Jákup Helgi Egholm, bæði úr Fuglafirði, búsitandi í Aalborg, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

27. juli fingu Lydia V. Vesturtún og Alfred T. Jacobsen, Eiði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4150 gr.

27. juli fingu Fríðunn E. og Peter Hentze,Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3750 gr.

29. juli fingu Beinta og Petur Nielsen, Froðba, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4175 gr.

## Til minnis um lítla Klæmint

Eri stødd í Betesda. Inni her er tungt og friðarligt. Uttan fyri er ljósur dagur, men her er myrkur og sorg. Ein bíðandi skari, tigandi, tárandi í tungum tonkum.

Vit bíða eftir eini lítlari kistu, sum er á veg. Um eina løtu vænta vit lítla-Klæmint inn her og hansara syrgjandi familju.

Ein hálvur tími gongur. Løtan nærkast. Kenni á mær, at hvør kykna ger mótstøðu. Eg vil hetta ikki. Hugsi um foreldrini. Um eg kenni slíka mótstøðu og slíkt máttloysi, hvusssu munnu so foreldrini hava tað?

So koma tey. Ein lítil vakurt pyntað kista. Eitt lítið fylgi. Men størri sorg havi eg ikki áður sæð. Ongin hevur mist meira enn hesi foreldur, sum mistu fimm-ára gamla sonin. Ongin kennir størri sorg enn tann, sum hevur mist tað allarkærasta.

Inni her eru vit savnað um familjuna at vísa samkenslu. Vit kenna okkum øll máttleys. Vit eru nádd har, vit ikki ynskja at lívið leiðir okkum.

Uttan fyri skínur sólin. Fuglurin syngur og dagurin er bjartur. Dagurin er vónríkur, og vónin troðkar seg inn gjøgnum vindeygað og inn í hvørt lítið hjarta, sum er til staðar.

So verður talað. Tá kemur vónin. Tað verður tosað um Staðin. Staðurin, har Klæmint er staddur. Klæmint er meira á lívi nú enn hann var, tá vit høvdu hann her millum okkum.

Nú kennir hann bert gleði og fullkomleika. Honum væntar einki, og hann kennir ongan sakn, tí Jesus fyllir alt í øllum.

Staðurin. Tað verður tosað um staðin, hvussu vakur og fullkomin hann er.

Ongin kennir størri vón enn tann, sum væntar hendan staðin. Og eingin kennir størri troyst í sorgini enn tann, sum hevur síni kæru trygg í hesum staðnum.

Um stutta tíð síggja vit Klæmint aftur. Og tá kemur ongantíð nøkur skilnaðarstund aftur.

Góði Klæmint! Eg eri glað fyri, at eg slapp at vera sunnudagsskúlalærari hjá tær. Eg eri so fegin um, at eg var við at fortelja tær um Staðin, sum Jesus gjørdi teg til reiðar at fara til á so ungum árum. Og eg eri so fegin um, at eg slapp at fortelja tær um Staðin, sum Jesus hevur gjørt tær ein bústað til reiðar í. Og har ert tú longu, og nú hevur tú allarbesta bíbillæraran, og tað er Jesus. Hann sleppur at fortelja tær bíbilsøgurnar, eg og foreldur tíni ikki náddu at fortelja tær í tínum stutta lívi.

Kanska eg havi lært teg okkurt, men tú og pápi tín hava lært meg meira. Tá tú seinastu tíðina kom í sunnudagsskúla, vart tú vorðin veikur av sjúkuni. Tú orkaði minni og minni. Men pápi tín bar teg. Og hendan myndin minti meg á, hvussu okkara Faðir ber okkum, tá vit eru veik. Tá vit ikki orka at ganga leiðina, tí hon er ov tung, tá ber Hann okkum.

Og tá Hann ber okkum, tá eru vit trygg, tí tá eru vit nær Hansara hjarta. Og tað er har, Hann ynskir okkum at vera: nær Hansara hjarta, at hoyra Hansara rødd og merkja Hansara hjartasláttur.

Soleiðis minnist eg teg: borin á sterkum faðirørmum í sunnudagsskúla. Og vit vita, at tú nú ert borin á einglaveingjum Heim, Heim í fang Abrahams. Tí har heima eru hinir ævigu bústaðir og herniðri hinir ævigu armar.

*Heilsan frá sunnudagsskúlanum*

**Maria**



## Tøkk

Hjartans takk til tykkum mongu, sum gjørdu 60 ára dagin til nakað heilt serligt fyri okkum.

Takk til Árna av Reyni, Dupultkvartettina/Jóanes á Váli, Eli & Britu/Pætur í Skemmuni, Evald Sørensen og børnini/Pætur Larsen fyri vakran sang og spæl.

Takk fyri gávur, heilsanir, SMS'ir, uppringingar og fjarrit.

*Tí góður er Harrin; náði Hansara varir til ævigar tíðir, trúfesti Hansara mann eftir mann.*
*Sálm. 100.5*

Signað at eiga góðar vinir.

Kærar heilsanir til tykkum øll.

**Eivind & Sigrun**

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin



Tín stóri dagur
Takka í Sosialinum